tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 51 Mikudagur 13. mars 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00

## Politikkari skuldsettur fyri stuldur:



# Veljarin avger hansara framtíð

Veljarafelagið hjá Fólkaflokkinum í Vágum fer ikki at mæla til at Jørgen Niclasen verður koyrdur úr politikki. Tað má veljarin sjálvur avgera. »Talan er ikki um nakað mál, tí Fiskavirking hevur ikki meldað Jørgen Niclasen fyri at hava stolið maskinur av virkinum í Sørvági, sigur Jákup Guttesen, formaður síða 8

## Lopra er fyrsta prógvið:



# Vit snorksova - onnur fara við oljupengunum

– Vit hava gjørt alt ov lítið fyri at fyrireika okkum til eina møguliga oljuvinnu. Endin kann lættliga verða, at onnur fara avstað við øllum arbeiði í samband við oljuvinnuna, meðan vit snorksova. Orðini eigur Jóhan Petersen, tekniskur leiðari á Skipasmiðjuni Føroyar og nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag síða 7

# Niels Helveg kunnar okkum um ES

### Er á 24 tíma vitjan í Føroyum

Justinus Leivsson Eidesgaard

Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helvig Petersen, kom í gjár á almenna vitjan í Føroyum. Vitjanin er stutt, hann fer longu avstað aftur í dag við flogfarinum hjá Atlantic Airways.

Vitjanin byrjaði í gjár í høvuðsstaðnum við at uttanríkisráðharrin settist á fund við løgmann, hetta var um middagsleitið.

Klokkan eitt í gjár hitti Niels Helveg Petersen landsstýrið. Hetta hendi undir einum sokallaður arbeiðsdøgurða á Hotel Hafnia.

Klokkan trý í gjár hitti uttanríkisráðharrin og løgmaður uttanríkisnevndina við Helenu Dam á Neystabø á odda.

Í gjárkvøldið helt uttanríkisráðharrin ein fyrilestur í Norðurlandahúsinum um ES-samstarvið. Hetta var ein almennur fundur.

Klokkan níggju í gjárkvøldið fekk Niels Helveg Petersen næsta døgurðan hendan dagin. Hetta hendi á Hotel Føroyum og landsstýrið var vertur.

Fundur skuldi aftur verða við í dag og fyrrapartin kundu fjølmiðlarnir eisini hitta uttanríkisráðharran.





## *Grønlendsk landsstýriskvinna*

# Tann einstaki skal takast við í ráðum

síða 8

